## Mugu taka støðu til Serbia

Eftir at The Dreams høvdu spælt seg víðari frá hálvfinaluni í danska Grand Prixnum, segði sangarin í bólkinum, Hans Edward Andreasen, at skuldi tað hent, at bólkurin vann finaluna eisini, so máttu teir geva avboð til europeisku kappingina.

- Vit hava prátað eitt sindur um hetta. Vit tora f aktiskt ikki til Serbia at spæla, so eg veit ikki, hvat vit gera, um vit vinna kappingina. Kanska mugu vit bara geva avboð og lata onkran annan fara avstað, segði Hans Edward Andreasen – helst sum skemt.

Men leygarkvøldið kann tað henda, at teir verða noyddir at taka støðu til luttøkuna í europeisku kappingini.



# ri framman



*The Dreams kunnu komandi dagarnar fáa sítt veruliga gjøgnumbrot í donskum tónleiki*
*Mynd: Polfoto*



*The Dreams eru komnir langan veg síðani fyrstu tíðina sum lívligur punkbólkur í Føroyum*

- Vit hava tosað nógv um luttøkuna í Grand Prixnum, og eg havi sagt við The Dreams, at teir skulu kunna standa inni fyri tí. Teir skulu varðveita sín stíl og sín tónleik, og so ber tað saktans til at verða við í Grand Prixnum. Og tað er júst tað, sum teir hava gjørt. Teir eru ikki ávirkaðir av Grand Prixnum, men hava sítt egna show og sín egna sang við í Grand Prixnum, og tað er týdningarmikið, sigur hann.

### Liggja til at vinna

Luttøkan hjá The Dreams í danska Grand Prixnum kann nú enda við, at teir hanga upp á ein møguligan sigur í donsku kappingini.

Fyri viku síðani segði Chief 1 soleiðis um Grand Prix-luttøkuna hjá The Dreams:

- Vit vildu vera tað skeiva innslagið í Grand Prixnum og vísa The Dreams fram, og tað hava vit gjørt. Sangirnir á teirra myspace-síðu hava verið spældir 10.000 ferðir, og tað sama er við teirra framførslu frá Grand Prixnum, sum liggur á YouTube. Og tað er sjálvandi eyka hugaligt, at vit komu í finaluna í Grand Prixnum, og nú kunnu vit vísa enn fleiri fólki, hvat The Dreams eru.

Síðani er tað hent, at fólk eru farin at halda, at The Dreams kann vinna Grand Prixið. Veddingarfyritøkurnar vísa á tveir stórar favorittar – The Dreams og Simon Mathew – og tá ið hugsað verðu um, hvat føroyingar kunnu mobilisera av sms-atkvøðum, so er góður møguleiki fyri, at The Dreams kann vinna í annaðkvøld.

Føroyska songkvinnan Petsi Tvørfoss, um sjálv hevur roynt seg í danska Grand Prixnum heldur, at The Dreams hava ein veruligan kjans at vinna kappingina.

- Mær dámdi sera væl framførsluna hjá teimum. Hon var øðrvísi enn allar hinar, og sangurin var eisini góður. Tað er trupult at siga, hvør fer at vinna, og tað veldst eisini um, hvørjir aldursbólkar fara at atkvøða í kappingini. Um tað verða nógv ung, sum fara at stemma, so hava The Dreams ein góðan møguleika. Og so skulu vit heldur ikki gloyma, at teir fáa nógvar atkvøður úr Føroyum, sigur Petsi Tvørfoss.